# Elin Heinesen og Ad Libitum framføra Yndisløg

Í kvøld, mánakvøldið 5. februar verður høvið at fáa eina smakksroynd av fløguni Yndisløg, ið Elin Heinesen og Ad Libitum geva út í næstum

Enn gongur ein stund til Yndisløg verður givin út. Fløgan er úrslitið av samstarvi, ið Elin Heinesen og mammubeiggin Svenn Brimheim fóru undir fyri nøkrum árum síðan. Við fløguni heldur Elin lyftið, ið hon gav mammubeiggja sínum, beint áðrenn hann doyði, um at gera teirra felags verkætlan lidna. Hetta eru løg, ið Elin og Svenn spældu við sjúkraleguna hjá mammu Elina, og sum tey vóru samd um, at tey áttu at verið gjørd í føroyskum útgávum. Tónleikurin er sonevndur easy listening tónleikur, og tí tykist tað eisini hóskandi at fløgan er gjørd í samstarvi við bólkin, ið Svenn hevur spælt í Ad Libitum, ið ivaleyst er Føroya besti easy listening bólkur.

Atgongumerki til konsertina á 50 kr. fáast við dyrnar. Konsertin byrjar kl. 19.30.

# Ferðafólkið hevur enn álit á Norrønu

**Smyril Line rør út av nýggjum við glæsiligum faldara, nú flaggskipið endiliga kemur aftur í sigling. Hesuferð lá Norrøna 2 vikur longur í dokk enn ætlað, men enn hevur ferðafólkið stórt álit á Norrønu, tí nógv fólk hava longu bókað sær eina ferð í summar, sigur Hendrik Egholm, Sølu og Marknaðarstjóri hjá Smyril Line**

FERÐAVINNA
*Eyðhild Jacobsen*
*eydhild@sosialurin.fo*




Kendur gestur lá á Havnarvág kalda mánamorgunin. Tað var nevniliga Norrøna, ið endiliga aftur er farin á flot. Og hesuferð skal tað verða við ordiligum stíli. Ikki færri enn 400.000 eintøk á 7 ymiskum málum, enntá so forkunnugum sum flamskum og italenskum, av ferðafaldarum eru farin á prent. Og tað er ikki eiti á, ið lagt verður fyri. Glæsiligar myndir skulu lokka fólk ikki bara umborð á Norrønu, men eisini til Føroya, Ísland, Hetland og sum nakað heilt nýtt til Skotland.

– Vit gera henda faldara fyri at branda okkum og eisini Føroyar sum ferðamannaland. Allir føroyingar vita nokk, hvat Smyril Line er, men tað er stór kapping á altjóða marknaðinum, og so er tað gott at vísa á, at vit eisini eru til við einum so glæsiligum faldara, sigur Hendrik Egholm.

## Ferðafólkið trýr enn uppá Smyril Line

Smyril Line metur, at hóast Norrøna hevur ligið leingi still, so hava teir ikki mist nógv ferðafólk. Hinuvegin vísa teir á, at tað onkutíð er neyðugt at fara í dokk.

– Vit vita sjálvandi, at tað er óheppi, tá ið skipið liggur longri í dokk enn væntað, men vit avgjørdu at gera allar smálutir í ordan, soleiðis at skipið megnar tað strævnu summarsiglingina til fulnar, sigur Hendrik Egholm.

Og tað eru tekin um, at ferðafólkið ikki hevur mist álit á skipinum, hóast heldur óstabilan flutning í seinastuni. Tí nógv ferðafólk hava longu bókað sær ferðir, so Smyril Line væntar eitt gott summar.

## Ávísur inntøkumissur

At leggja eitt ferðamannaskip stilt er sjálvandi ikki altíð so gott fyri inntøkuna. Og Hendrik Egholm váttar, at tað hevur verið inntøkumissur av, at skipið hevur ligið stilt longur enn ætlað. Men tó hevur ongin gestur verið við sviðið svoð.

– Øll ferðafólk eru komin vegin fram, um ikki við Norrønu, so við alternativari ferðing so sum við flúgvara, sigur Hendrik Egholm at enda.

Løgreglutíðindi:

# Tríggir naknir menn í Havn

**Sunnunáttina fekk løgreglan í Tórshavn eini heldur óvanlig boð. 3 ungir menn høvdu avgjørt at klæða seg úr øllum klæðunum, hóast tann ógvusliga kuldan**

LØGREGLA
*Eyðhild Jacobsen*
*eydhild@sosialurin.fo*

Um tú vart ein túr í býnum sunnunáttina, hevur tú allarhelst sæð eina heldur óvanliga sjón. 3 ungir menn, ið høvdu fingið eitt sindur ov nógv upp í høvdið, gjørdu tá ikki minni enn at klæða seg úr øllum klæðunum mitt í Havn í kava. Onkur hevur helst tikið synd í ungu monnunum, tí løgreglan bleiv boðsend, og menninir vórðu koyrdir til hús at verma seg.

## Fløska tveitt eftir løgregluni

Eini 50 ungfólk nýttu fríggjanáttina høvi til at koma saman í veitslu í Havn. Tað, sum skuldi verið eitt stuttligt kvøld, endaði í einum stórum ruðuleika, og ein 17 ára gamal drongur bleiv skuldsettur fyri at tveita við fløsku eftir løgregluni

Fríggjanáttina bleiv løgreglan boðsend til húsaófrið mitt í Havnini. Her vísti tað seg, at eini 50 ungfólk, ið høvdu veistlu, høvdu hug at larma ov illa. Løgreglan tyktist ikki at verða vælkomin, tí tá ið løgreglan nærkast húsinum, bleiv ein fløska tveitt eftir løgregluni. Tað mátti tilkallast fleiri løgreglufólk fyri at fáa skil á ruðuleikanum; eina løtu umhugsaði løgreglan at nýta kniplar og hundar. Tó fekk løgreglan tamarhald á støðuni, áðrenn farið var so langt, og tey ungu fólkini vórðu spjadd frá hvørjum øðrum. Tó slapp ein 17 ára gamal drongur ikki so lætt. Hann bleiv skuldsettur fyri at tveita við fløsku eftir løgregluni.

## 19 ára gomul genta yvirkoyrd

Tá ið hálkan kemur, plaga ferðsluvanlukkurnar eisini at koma. Soleiðis var eisini hetta vikuskiftið í Havn. Millum annað varð ein 19 ára gomul genta yvirkoyrd í Havn fríggjakvøldið. Gentan bleiv flutt á sjúkarhúsið.

Umframt tey vanligu bilóhappini í hálkuni í vikuskiftinum, so koyrdu 4 bilførarar ávirkaðir í miðstaðarøkinum. Teir kunnu allir vænta at missa koyrikortið. Eisini vórðu ferðslumátingar gjørdar í og uttan fyri Havnina og í Norðoyatunnlinum. Í Norðoyatunnlinum skikkaðu bilførararnir sær bara væl. Har var mest málda ferð 106 km/t. Ein bilførari, ið koyrdi uttanfyri Havnina, kann tó vænta at missa koyrikortið. Hann koyrdi 135 km/t.